# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## So hendi tað aftur

Føroyingar hava so enn einaferð upplivað, at ein løgmaður hevur sagt ein av sínum landsstýrismonnum úr starvi. Hetta tykist vera vorðin ein afturvendandi siður hjá ikki bara hesum men eisini undanfarnum løgmonnum. Hetta byrjaði við Edmundi Joensen, sum fyri júst 10 árum síðani segði Sámal Petur í Grund úr starvi. Síðani tá eru fleiri landsstýrismenn sagdir úr starvi ella eru trýstir til at leggja frá sær. Verandi løgmaður hevur sagt ikki færri enn tríggjar landsstýrismenn úr starvi.

Spurningurin er so, um hetta er ein skilagóð mannagongd. Svarið er bæði ja og nei. Sjálvandi skal ein løgmaður hava møguleika at siga ein landsstýrismann úr starvi, um hesin hevur brotið reglar og lógir. Nakað annað eru tær politiskt treytaðu uppsøgnirnar. Nær kemur inflatión í politiskar uppsøgnir kundi verið spurt! Er tað gott signal at senda út til almenningin, tá løgmenn siga upp fleiri av sínum landsstýrismonnum í einum valskeiði! Hevði betri samskifti og dialogur millum løgmenn og landsstýrismenn, millum embætisfólk og her ikki minst millum aðalstjórar í ymsum ráðunum kunnað forðað fyri, at mál útviklaðu seg til rein spreingimál. Við hesum skulu vit ikki taka dagar ímillum, hvørjir landsstýrismenn áttu ella ikki áttu at verið uppsagdir. Tað má eftirtíðin gera av.

Men málið um uppsøgn av landsstýrismonnum er eftir okkara tykki sera grundleggjandi og eisini rættiliga principielt, tí hetta hevur nakað við okkara nýggju stýrisskipan at gera. Undan henni bar ikki til at koyra landsstýrismann frá, tí tá var kollegialt stýri. At hetta varð broytt var kærkomið fyri mong. Spurningurin í kjalarvørrinum á seinastu uppsøgnini av landsstýrismanninum Jákup Vestergaard er, um ikki tíðin er komin til at evaluera stýrisskipanina. At seta hana undir lupp við nútíðar og framtíðar eygum. Og spyra: Hvussu hevur henda nýggja skipan við møguleika hjá løgmanni at siga upp sínar landsstýrismenn út frá politiskum orsøkum eydnast frá tí, at Edmund Joensen segði upp Sámal Petur í Grund til nú Jóannes Eidesgaard loysti Jákup Vestergaard úr starvinum.

Miðlahúsið í Vágsbotni, sum skipar fyri kjaki eitt nú á kendu Trapputingunum, fer at taka hetta málið upp antin í hesum árinum ella í komandi ári. Vit meta tíðina vera komna til at evaluera stýriskipanina.

**Sosialurin**

## Vit gleðast, dansa, kvøða og undrast

JÓNLEIF JOHANNESEN
Klaksvík



**Vit gleðast**
Tað var prátið um vistferðavinnu, sum fekk meg at frøðast. Elin Heinesen nevndi at ein stór avbjóðing lá fyriframman. Skuldu vit megna at bjóða teimum komandi ferðafólkunum eina uppliving, máttu vit bjóða teimum enn fleiri tiltøk. Helst skuldi tað vera okkurt, sum vit vóru góð til, og sum vit høvdu fingist við í fleiri hundrað ár. Tankar runnu fram fyri meg. Bátasmíð, seyðarakstur, bjargalív og ikki minst føroyskur dansur.

**Vit kvøða og dansa**
Eg eri virkin innan føroyskan dans, og havi tí eina føling við hvat hendir á hesum øki kring oyggjarnar. Satt at siga er støðan heldur vánalig. Sláið Ring, væl stuðla av limafeløgunum, hevur roynt at bjarga einum neista, men tungt er. Játtanin, tær 90.000 krónurnar, Sláið Ring fær frá landinum at bjarga kvæðunum og dansinum við, røkka ikki langt.

Vónin um at fólkaskúlin tekur hond um dansin, er við at hvørva, tí á skúlunum finst nærum einki tilfar at undirvísa við. Tað tilfar, sum er fingið til vega, er ein hjálp hjá teimum lærarum, sum hava røtur í dansinum. Hinir, sum ikki kenna til føroyskan dans, megna ikki at geva næmingunum eina holla undirvísing við núverandi tilfarið. Her stendur ikki væl til. Tí var eg so sera glaður, tá Elin Heinesen leitaði eftir einum menturnarøki, har vit eru tey bestu og hava hundra ára royndir. Lat okkum bjarga dansinum, kvæðunum við at "brenda" tey. Lat okkum verja dansin soleiðis, at hann kemur okkum øllum til góðar. Lat okkum menna dansin, so hann kann stiða vistferðavinnuna m.a. á útoyggj. Eg síggi fyri mær ein møguleika at menna útoyggjarnar, smábygdirnar, føroyska dansin, kvæðakunnleika, vistferðavinnuna og Føroyaland. Eg eri eingin reklamuleyva, men í mínari verð, er føroyski dansurin eitt megnaramboð, tá talan er um vistfrøðiliga ferðavinnu.

**Vit undrast**
Síðsta leygardag var aðalfundur í Sláið Ring. Fundurin var góður og gevnadi, men øll undraðu seg yvir, hví eingin av okkum hevði fingið innbjóðan til ferðavinnutiltakið, sum var í Norðurlandahúsinum, sama dag. Er føroyski dansurin og kvæðamentan okkara ikki brúkbar tá talan er um vistferðavinnu?.

Í mentanartíðindunum fríggjakvøldið 16. nov tók Elin Heinesen so ramliga til "Vit skulu hava samstarv, samstarv, samstarv". Lat okkum við samstarvi bjarga føroyska dansinum, menna útoyggjarnar og leggja lunnar undir vistferðavinnu í Føroyum. Vónandi setur Samvit seg í samband við Sláið Ring - landsfelag føroyskum dansi at frama, í nærmastu framtíð.

## Hava vit álit á monnum?

NITA NÆS



Um løgmaður hevði valt ein annan møguleika, so mistu vit øll álitið á honum.

Tí má sigast, at løgmaður gjørdi púra rætt.

Í einum lítlum samfelagi sum okkara, er tað av alstórum týdningi, at fólkavald umboð okkara og landsstýrsfólk okkara fylgja stýrisskipanarlógini, og búka vanligt skil og vit.

Um fólkaflokkurin slítur samgonguna, einans tí at flokkurin ikki tolir at merkja avleiðingarnar, at ein landsstýrismaður noyðist at fara, og annað fólk setast, so missa vit álit á Fólkaflokkin.

Tað er skelkandi at lesa, hvussu handfaringin av Strandferðsluni er farin fram.

Flot – Regin - at tú tók avleiðingarnar!

Umskylda Niels Harald Michelsen, at vit sum samfelag ikki eru komin longur!

Harmiligt at báðir "gomlu" skipararnir skulu fáa slíka viðferð, og nú á enda gjørdist daglig negativt tíðindatilfar, einast tí at samgongan setti sær fyri at føra nakað so einfalt sum seniorpolitikk.

At enda: Fókaflokkurin hevur nú gylta møguleikan at seta eina landsstýriskvinnu í sessin – seinastu vikurnar av samgonguskeiðinum.

Fyri okkum vanligu samfelagsbogarar hevur tað týdning, at bústaðarpakkin kemur fyri tingið og verður avgreiddur, áðrenn hetta samgonguskeiðið er av. Tað eru so nógv fólk í hesum landi, ið ikki eru før fyri at seta seg fyri hørð og stór húsalán. Tað má tí ikki enn einaferð ganga út yvir okkum borgarar, at ávís landsstýrisfólk gera feilir, ið hava við sær, at flokkar og menn gerast fornermaðir og smekka við hurðini.

Vísið tykkum nú sum menn eiga: Takið ábyrgd!

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar. Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.